## Illa løntir lærarar



Norskir lærarar eru millum teir lægst løntu skúlalærararnar í Evropa. Tað sæst í einari kanning. Har sæst millum annað, at meðallønin hjá einum norskum lærara er 35.000 amerikanskar dollarar, og tað setir Noreg á 19. pláss millum OECD-londini, skrivar Bergens Tidende. Til sammetingar verður nevnt, at ein týskur lærari fær í meðal 51.000 dollarar. Lærararnir í Luksenburg eru teir best løntu. Teir fáa í meðal 88.000 dollarar um árið.

## Skotskur og írskur fólkatónleikur í Manhattan

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið fær Manhattan eina forvitnisliga vitjan av skotskum og írskum tónleikarum. Teir nevna seg ´The Islanders´ og spæla traditionellan fólkatónleik úr Írslandi og Skotlandi. Á skránni er bæði tað góða gamla frá the Dubliners og meira modernaður fólkatónleikur hjá Runrig, Wolfstone og U2. Við sær plaga teir at hava ymisk spennandi ljóðføri, so sum floytur, sekkjapípur, mandolinir, gittar og bass. Sum skilst leggur bólkurin seg eftir at skapa eitt hugnaligt og stuttligt kvøld við lívi í. Umframt at spæla í Onglandi, Skotlandi og Írlandi hava ´The Islanders' eisini vitjað Týskland, Avstalia og flestu norðulendsku londini. Í Danmark heuvr bólkurin m. a. luttikið á Bogense festival, RavneRock Festival, og Tønder Festival. Og nú er stundin komin til Føroyar.

# Stóra toskalygnin

**Atlantstoskur er komin upp á javnt føti við eitt nú grindahval hjá grønu felagsskapunum, sum nýta hesi sjódjór sum pengamaskinur, skrivar Fishing News í seinastu útgávu síni**

TOSKASTOVNUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Toskastovnurin hevur verið orsøkin til hitað kjak, óendaligar spekulatiónir og ótømandi orðaskvaldur, umframt eina rúgvu av ørum tankum og nógvum misskiljingum.

Fyri nøkrum mánaðum síðani var ein ráðstevna fyriskipað av North Sea and North-Western Waters Regional Advisory Counsils (RAC) um støðuna hjá toskastovnunum í europeiskum sjógvi fyri fiskimenn, fiskifrøðingar, politikarar og umhvørvisfólk.

Fiskimenn vóru samdir um, at meiri toskur er til nú enn teir høvdu sæð í áravís. Kanningar benda á, at stovnarnir við Grønland vaksa við øgiligari ferð. Um hendan økingin stavar frá ógvusligum upphøggingum í fiskiflotunum, áløgd av Brüssels, ella einum náttúrligum uppsvingi í biomarina umhvørvinum, kann kjakast um, men veruleikin er:

- at Ísland hevur veitt umleið 200.000 tons av toski
- at Barentshavið útvegar onnur 500.000 tons á hvørjum ári
- meiri toskur verður lógliga veiddur við Føroyar og í europeiskum sjógvi
- toskafiskiskapurin við Grønland er í vøkstri

Hetta merkir, at áleið ein millión tons av toski verður veidd á hvørjum ári, fyri tað mesta til europeiska marknaðin.

Toskur er tí ikki í námind av at vera ein hóttur stovnur.

- Fish & Chip-sølubúðin hinumegin vegin, har eg búgvi, lýsir við 'toski og chipsi' fyri 25 krónur – ikki júst ein ábending um ein útdoyggjandi toskastovn, sum greinahøvundurin, Quentin Bates, tekur til.

Grundleggjandi fíggjarlig meginregla sigur, at er toskurin veruliga so sjáldsamur, sum umhvørvisfelagsskaparnir vilja vera við, átti prísurin at verið nakað hægri. Í veruleikanum hevði toskur bert verið at funnið á fínastu matstovum, sum bert ríkastu kundarnir høvdu ráð til. Og hetta er langt frá so.

Greenpeace handaði herfyri fyrrverandi bretska forsætismálaráðharranum, Tony Blair, ein útstappaðan tosk við boðunum um, at hetta var hin seinasti. Forsætismálaráðharrin er síðani farin, men toskurin er enn her.

WWF hevur tikið tað óvanliga stigið at drigið fiskiveiðikommissiónina hjá ES fyri rættin, orsakað av teirra toskapolitikki, meðan Greenpeace ítøkiliga hevur jagstrað fiskiskip, sum royna eftir toski og farmaskipini, sum flyta frysta fiskaúrdráttin suðureftir.

Nýggjasta »stuntið« hjá felagsskapinum hevur verið at slept froskmonnum á sjógv millum skotskar partrolarar við »steðgið toskafiskiskapi«-skeltum.

Tá hugsað verður um, at tað finnast sunnir og vaksandi toskastovnar eins og stovnar, sum eru um at koma fyri seg, at tað er eingin mangul á toski á europeisku marknaðunum, og at fiskiskip í Norðsjónum hava trupulleikar við at umganga tosk í trolið, er framferðin hjá Greenpeace ófatilig.




*Nýggjasta »stuntið« hjá Greenpeace er at sleppa froskmonnum á sjógv millum partrolararnar við »Steðgið toskaveiðini«-skiltum*

Umhvørvisumboð vóru á ráðstevnuni í Edinburgh, men kanska tey ikki noteraðu nakað niður. Støðan hjá umhvørvisfólki er antin hon, at tey heilt síggja burtur frá veruleikanum, ella tey vilja ikki síggja hann í eyguni. Hin møguleikin er, at tey útmerkað væl kenna veruleikan, men velja at vraka hann av ókendum orsøkum.

Ein talsmaður fyri Greenpeace segði um avgerðina at lata froskmenn leypa á bláman millum tveir partrolarar frá Frazerburgh: »Støðan í Norðsjónum er ómetaliga einføld. Heldur toskafiskiskapurin fram, verður toskurin oyddur«.

Samspælið millum róvfisk og matfisk, broytandi hita í sjónum, umfatandi broytingar í planktonnøgd, gýtingarbroytingum, dálking og onnur viðurskifti ávirka fiskastovnarnar, og tað vita umhvørvisaktivistarnir. Men fiskiskapurin fær skuldina.

Óhoyrda einfeldi í tí tey siga er ótrúligt og vísir eitt djúpt manglandi forstáilsi – ella beinleiðis mótvilja – at skilja fløktu støðuna.

### Gera sær dælt

Gjøgnum sjeyti- og áttatiárini samlaðu umhvørvisfelagsskapirnir seg um átøk móti hvalaveiði og seinni kópaveiði. Í hesum tíðarskeiði fóru umhvørvisfelagsskapirnir gjøgnum eina mening frá felagsskapum til ein ídnað.

Herferðir teirra vóru stak væleydnaðar, bæði tá tað snúði seg um at steðga hvala- og kópaveiði – og samstundis leggja í oyði tey smásamfeløg, sum livdu av hesum veiðum – og at savna inn óhoyrdar upphæddir til sín sjálvs.

Eins og allar aðrar fyritøkur mugu eisini NGO's (nongovernmental organisa-



*Tað stendur langt frá so illa til við toskastovnunum, sum umhvørvisfelagsskapirnir royna at fáa tað til*